## HEILSANIR



**Góða elskaða Jórunn**
Hjartaliga tillukku við teimum 4 árunum tann 7. febr. Má Jesus pápi verða hjá tær.
**Ynskja mamma, babba, Jóannes og Heidi**



**Góða Rannvá**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum í dag. Vit gleða okkum at sleppa í føðingardag. Alt tað besta.
**Heilsan Sólgerð og Rósa**



**Góða Karolina**
Hjartaliga tillukku við teimum 22 árunum tann 13. febr. Eisini ynskja vit tillukku við prógvnum. Vónandi trívist tú í tí nýggja starvinum.
**Bestu heilsanir mamma, babba og systkini**



**Góði Høgni**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum í dag.
**Ynskja mamma, babba, Bartal og Rani**



**Góði fitti Poli**
Tillukku við 2 ára føðingardegnum og alt tað besta ynski eg tær. Didde er so góð við teg.
**Heilsan Birgit**



**Góð omma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum í dag 13. febr. 1000 takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg. Mussar og klemm frá
**Erik og Lindu**



**Góða mamma og vermamma**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 70 ára degnum í dag 13. febr. Takk fyri alt. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan Katy og Reidar**



**Til piparsveinin á Válinum**
Tillukku við 30 ára degnum - skunda tær nú.
**Ynskja vit á Húsum**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum tann 12. febr. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Omma og Arngrím**



**Góði elskaði Jón Rói**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góði elskaði Poli**
Hjartaliga tillukku við tínum 2 ára føðingardegi í dag. Jesus pápi signi lívsleið tína. Vit elska teg. Muss og klemm frá
**mammu og babba**



Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 7 ára degnum.
**Heilsan omma, abbi og Jan**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

#### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.................................................................
.................................................................
.................................................................
.................................................................
.................................................................
.................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .................................................................
Bústaður: .................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# Tøkningur

## til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum tøkningur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Starvið fevnir m.a. um:**
- meting um tøkniligarloysnir
- fremjing av tøkniligum loysnum
- meting um dygd av hjálpartólum
- skipa fyri umvælingum av hjálpartólum
- heimavitjanir saman við terapeutum
- ráðgeving í sambandi við íbúðarbroytingar
- størri tillagingar av hjálpartólum saman við terapeutum
- viðlíkarhald av eykalutagoymslu
- fyrisitingarligar uppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- breiða tøkniligan vitan
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 21. februar 2003 kl. 14.00.




## HEILSANIR



Hon bleiv bert 61. Hjartaliga tillukku við degnum.
**Ynskja vit!**
**PS.** Gita hvør



**Góða fitta Rannvá**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Her ger tú nokk mat. Tað verður lekkurt at sleppa at smakka.
**Heilsan ommudiddan og Jógvan**



**Elskaða Rannvá**
Nú er tú blivin stór. Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum í dag. Nú síggjast vit skjótt aftur. Muss og klemm.
**Mamma og babba**



**Góða Rannvá**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 14. febr. Vit elska teg.
**Heilsan omma, Vitus, Rap og Perry**



**Góða fitta Rósa**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum og alt tað besta í framtíðini.
**Bestu heilsanir omma, abbi, Frank og Martin**



**Elskaða Jensia**
Hjartaliga tillukku við 12 ára føðingardegnum. Her hevur tú fingið góðan fong.
**Heilsan mamma og pápi**

**Góða Rannvá og Rósa**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 26. jan. og 14. febr. Nú koma tit skjótt at vitja okkum aftur.
**Heilsan Heiðrikkur, Rúni, Súsanna og Valborg**





**Hey tit báðar**
Hjarta tillukku við døgunum tann 26. jan. og 14. febr. Alt tað besta.
**Heilsan Bárður gubbi**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Linda**



**Hey omma og abbi!**
Hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum. Takk fyri alt tit eru so góð við meg. Eg elski tykkum.
**Heilsan diddan.**